gult30 cyan30 magenta30 svart30



# Til sølu



Um hóskandi boð fæst, verður sethúsagnin Garðsgøta 4 á Argjum seld.

Húsini eru í tveimum hæddum, hvør 125 m². Tey eru bygd í 1997. Grundøkið er 600 m².

Í neðra er vaskirúm, stórt kamar og kjallararúm 74 m², sum kann innrættast. Í erva er gangur, grovkøkur við útgongd til hjall, 2 baðiverilsi, niðurgongd í kjallara, stórur køkur og stór stova við útgongd til altan, hjúnarúm og 2 kømur.

Gjørt er rundan um húsini við urtagarði og terassu. Á stykkinum er eisini garaga.

Talan er um eina sera snotiliga ogn bæði innan og uttan, ið liggur væl fyri við góðum parkeringsmøguleikum, tætt við skúla og spælipláss.

Nærri upplýsingar fáast um ognina við at venda sær til

**Advokatskrivstovuna**
Fr. Petersensgøtu 9
100 Tórshavn · Tlf. 311145
att.: Fríða Patursson, adv.

**Mentamálastýrð**

# Lærugreinaráðgevi

***Starvið***
Í Mentamálastýrinum/Landsmiðstøðini eru nakrir tímar sum ráðgevi leysir at søkja til setanar frá 1. august 2001.

Ráðgevingin fatar um lærugreinirnar **landalæru og søgu/samtíð**. Dentur verður lagdur á, at arbeitt verður í tvørgreinaligum høpi, og møguleiki er at søkja eina ella fleiri lærugreinir.

Samanlagt eru 8 lønartímar um vikuna at søkja (ein lønartími svarar til umleið 1½ fyrisitingartíma). Vanliga verður ráðgevi settur við 8 til 12 lønartímum um vikuna.

***Førleikakrøv***
Umsøkjarar eiga at hava hollan ástøðiligan kunnleika og starvsligar royndir í viðkomandi lærugrein/-um og starvsøkjum, starvið fatar um. Væntað verður, at lærugreinaráðgevin hevur førleika og er hugaður at nýta KT í ráðgevastarvinum.

***Setanar- og lønartreytir***
Lærugreinaráðgevin verður settur eftir avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag. Tann, ið settur verður, skal undirvísa írestandi tímarnar í skúlanum, har viðkomandi starvast dagliga.

Ein starvslýsing er galdandi fyri ráðgevastarvið. Lagt verður upp til eitt skipað samstarv millum ráðgevarnar, møguliga í tvørgreinaligum bólkum.

***Umsókn***
Umsókn við prógvum o.ø. skal verða Landsmiðstøðini, Hoyvíksvegi 72, Postrúm 3084, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 4. mai 2001.

Gjøllari upplýsingar fáast frá leiðaranum á Landsmiðstøðini, tlf. 318825.

**Mentamálastýrið og Landsmiðstøðin**

***Mentamálastýrið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt hevur stýrið uppgávur, ið viðvíkja kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
***Landsmiðstøðin*** *er tænastustovnur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingarambod, hevur verkstaðarmøguleikar, hevur saman við Mentamálastýrinum eina lærugreinaráðgevaskipan og skipar fyri fak- og inspiratiónsskeiðum fyri lærarum.*

**TK Stovan**

**Ókeypis ráðgeving**

**Endamálið við TK Stovuni er at skapa vøkstur og menning á føroyskum virkjum.**

Vit kunna vegleiða tær í spurningum viðvíkjandi rakstri, menning og leiðslu. Røkkur okkara kunnleiki ikki, fáa vit samband í lag við aðrar ráðgevar, ið kunnu hjálpa tær.

**31 73 66**
**www.tk.fo**

**TK Stovan**
Niels Finsensgøta 37
FO-100 Tórshavn
**Fax** 319363
**www.**tk.fot
**E-mail** tk@tk.fo

VILJI VITAN VØKSTUR

# Bilur við frontskaða til sølu

**Merki:** Opel Astra G Club, 5 hurðar, turbo diesel
**Árg.:** 1998
**KM.:** 62.000
**Eyka útgerð:** 5 gear, el-rútar, centrallás, umdr.teljari, servostýring og air-bag.

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Magni Petersen
t-postur: mpe@trygging.fo
beinl. tlf. 345728
fax nr. 345607
at hitta mánadag–hósdag millum kl. 8.00–10.00 og fríggjadag kl. 08.00–16.00.

***Leikhúsið Gríma***

sýnir leikin

## *Eitur nakað land Week-end?*

av Jóanes Nielsen
leikstjórn Eyðun Johannessen
á Meiarínum

*Farið verður undir seinastu sýningarnar av »Eitur nakað land Week-end«*

**leygardagin 28.04.2001 kl. 18.00**
**sunnudagin 29.04.2001 kl. 16.00**

Atgongumerki á kr. 100,- fáast á Kunningarstovuni og við dyrnar 1 tíma undan sýning. Bólkar uppá 10 ella fleir fáa 20% avsláttur.

# Fólk til byggiarbeiði

Til nýggja byggipláss okkara – útbygging av Landssjúkrahúsinum – sóknast vit eftir forskallarum, jarnbindara, førara til tornkrana og royndum betongblandimeistara. Byrjað verður miðjan mai mánaða.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:

**E. Pihl & Søn Føroyar P/F**
Sten Balle, tlf. 225030, ella
Boga Hansen, tlf. 0045 45277266

# Reingerðarfólk

Søkt verður eftir avloysara fyri reingerðarfólk við Miðvágs/Sandavágs Skúla frá 21/05 til 15/10-2001.

Umsóknir skulu vera Miðvágs kommunu í hendi seinast fríggjadagin 11/05-2001.

**Miðvágs kommuna**

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Sálarfrøðilig ráðgeving og viðgerð

Frá 1. apríl arbeiði eg sum privatpraktiserandi sálarfrøðingur.

Ring um nærri upplýsingar.

**Ása Ellefsen**
***autoriseraður sálarfrøðingur***
Tlf. 318464 og 218464

gult31 cyan31 magenta31 svart31



# MANNING

Hervið verður søkt eftir
**manning**
til M/F Norrönu, til summarsiglingina 2001, sum byrjar 19. mai



Størvini, ið sett verða, umfata allar deildir innan catering so sum:

Pursarar, kokkar, bakarar, sleiparar, barrfólk, cafeteriafólk, tænarar, kioskgentur, koytugentur og informatiónsgentur.

**Fylgjandi krevst:**

- **Heilsuprógv** fyri sjófólk, ikki eldri enn 2 ár.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

**P/F SMYRIL LINE**
Postboks 370
FO-110 Tórshavn

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Streymoyar Øki**

# Starv leyst at søkja á Toll- og Skattstovu Føroya,
## Streymoyar Øki

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar Øki, tollavgreiðslan, Eystara bryggja, Tórshavn er eitt starv leyst at søkja.

**Arbeiðsuppgávan**
Talan er um tollavgreiðslu av vørusendingum, EDV-viðgerð og kannan av tollingaráheitanum og annað arbeiði í sambandi við tollavgreiðslu.

**Førleikakrøv**
Tann, sum settur verður, skal hava skrivstovuútbúgving, hava kunnleika til EDV, verða fyrikomandi og kunna arbeiða sjálvstøðugt. Umsøkjarar, sum hava royndir innan tollavgreiðslu, hava fyrimun.

**Setanarviðurskifti**
Starvið skal setast skjótast gjørligt. Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við upplýsingum um útbúgving og møgulig viðmæli skulu vera Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi 7. mai 2001.

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Streymoyar Øki**
**Postboks 3139**
**FO 110 Tórshavn**
(umsókn)

# Musikkskúlaskipanin

Søkir eftir lærarum í hesum greinum til setan í august 2001.

**Sello.** Fulltíðarstarv. Bústaður verður í Klaksvík.
Undirvísingarstøð: Klaksvík og Eysturoy. Førleiki á øðrum ljóðføri er fyrimunur.

**Messing.** Fulltíðarstarv. Bústaður verður í Vágum.
Førleiki í orkesturleiðslu er fyrimunur.

**Rútmiskari tónleikanámsfrøði.** Fulltíðarstarv. Bústaður verður í Eysturoy.
Undirvísingarstøð: Eysturoy og Klaksvík.
Fakini eru gittar, el bass, slagverk, samanspæl og forskúli.

**Sangi og klaver.** Fulltíðarstarv. Bústaður og undirvísing verða í Suðuroy.
Royndir í barnasangi og kórleiðslu krevjast.

**Blokkfloytu/klarinett/saxofon/fagott.** Starvið er ¾ av fulltíðarstarvi.
Undirvísingarstøð: Norðurstreymoy og Tórshavn.
Royndir í bólkaundirvísing er fyrimunur.

**Sangi.** Fulltíðarstarv. Bústaður verður í Tórshavn.
Undirvísingarstøð: Tórshavn og Norðureysturoy.
Undirvísingarroyndir í rútmiskum sangi krevjast.

**Klaver.** Fulltíðarstarv. Bústaður verður í Tórshavn.
Undirvísingarstøð: Tórshavn og Norðurstreymoy.
Hollur dugnaskapur í fylgispæli krevst.

**Klaver.** Tíðaravmarkað ¾ starv skúlaárið 2001/2002.
Undirvísingarstøð: Tórshavn og Nes Sókn.

**Førleikakrøv:** Musikkpedagogiskt prógv frá konservatorium ella onnur javnsett hægri tónleikaútbúgving. Framførsluroynd krevst í sambandi við setan.

Lønar- og setanarviðurskifti sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Musikklærarafelagið.

Umsóknarfreist: 7. mai 2001

Meira fæst at vita hjá leiðaranum.

Umsókn skal sendast til:
Musikkskúlaskipanin
Martin Mouritsen, leiðari
Hoyvíksvegur 72
FO 100 Tórshavn
T-postur: martin@mms.fo
Tlf 316462 / 216462
Fax 316991

Í musikkskúlaskipanini eru í løtuni tilsamans 1150 næmingar. Skúlarnir eru Tórshavnar, Klaksvíkar, Suðuroyar, Norðurstreymoyar, Vága, Nes Sóknar, Fuglafjarðar, Norðljómur, Sandoyar, Leirvíkar, Stranda, Skála, Oyndarfjarðar og Fossánesar Musikkskúlar.

Kommunalir myndugleikar skipa karmar, sum leiðari á staðnum fyrisitur. Lærararnir hava hægri tónleikaútbúgving. Mentamálastýrið hevur fakligu og námsfrøðiligu ábyrgdina av undirvísingini.

# Prutl við skaða til sølu

**Merki:** Aprilia 50 RS
**Árg.:** 2000
**KM.:** 5.123

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Fróði Müller, sýnsmaður
t-postur: fm@trygging.fo
beinl. tlf. 345727
fax nr. 345607
at hitta mánadag–hósdag millum kl. 8.00–10.00 og fríggjadag millum kl. 08.00–16.00.

T Ó R S H A V N A R   K O M M U N A

# Maskinførari

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir maskinførara til lítla gravmaskinu til vegdeildina, at byrja beinanvegin.

Áhugað verða vinarliga biðin um at venda sær til Snarskivuna á tlf. 31 51 60.

**Tórshavnar kommuna**
**Tekniska deild**

S N A R S K I V A N

# Privatpraktiserandi sálarfrøðingur

Sálarfrøðilig ráðgeving og viðgerð.

**Marita Sámalsdóttir Petersen, aut. sálarfr.**
Magnus Heinasonargøta 20, Tórshavn
Tlf. 31 32 29, Teldupostur: marisam@post.olivant.fo

Sosialurin
www.sosialurin.fo